# Oddagrein

**Eirikur Lindenskov**
*eirikur@sosialurin.fo*



# TÁ MEIRILUTIN RÆÐUR...

Tað kann verða eitt sindur strævið, tá tað er meirilutin, sum ræður. Soleiðis kundu vit útlagt støðuna, nú vit hava eitt minnilutalandsstýri, sum finnur sær ymsar meirilutar til tess at sigla millum skerini.

Tað gav at bíta hjá fleiri, tá løgtingið í síðstu viku samtykti bæði at loyva brygging og sølu av sterkum øli og brygging av brennivíni í Føroyum. Sjálvandi eru fólk ikki samd um hetta, men ein stórur meiriluti í løgtinginum vil hava tað soleiðis, og kanska tann meirilutin eisini umboðar meirilutan í fólkinum. Tað fáa vit so at síggja innan fáar mánaðir.

Men tað sum kortini var áhugavert var, at fleiri av teimum, sum vóru ímóti, vildu leggja trýst á – og mæltu beinleiðis umboðum úr Javnaðar- og Sambandsflokkinum um at trýsta sínar egnu at atkvøða ímóti.

Eitt av teimum 32 málinum, sum standa á skránni til løgtingsfundin í dag er »Uppskot til samtyktar um at skipa Føroyar frælsar«, sum Tjóðveldi hevur lagt fyri tingið - og sum flokkurin nú vil hava tingið at taka uppaftur til 2. viðgerð. Hetta málið, sum er eitt uppskot til samtyktar, snýr seg um at gera eina ætlan um, hvussu Føroya kunnu loysa frá Danmark.

Hetta evnið varð viðgjørt í Degi og Viku í gjárkvøldið, og har vísti Edmund Joensen á vandan, sum er, tá landsstýrið hevur so lítið tamarhald á parlamentariska grundarlagnum í løgtinginum.

Og rætt hevur hann, tí tað líkist nógv einum sjálvtøkuborði, soleiðis, sum løgtingið arbeiðir nú. Men tað skal ikki lastast Tjóðveldinum, tí flokkurin ger bara tað, sum er skilabest. Hann hevur gjørt eina makrelsamgongu við Javnaðar- og Sambandsflokkin, og við at lata løgmann og landsstýri sita, so kann flokkurin fáa fleiri mál á skrá, sum kanska kunnu koma ígøgnum tingið. Málið um ølið og brennivínið var eitt, sum kom í gjøgnum á henda hátt, hóast tað ikki var eitt tjóðveldismál, og tað sum flokkurin helst vónar við uppskotinum um at skipa Føroyar frælsar, er at fáa stuðul frá



Fólkaflokki – og helst frá Miðflokki, Sjálvstýri og Framsókn við - og so hava vit brádliga aftur Fullveldissamgonguna við 20 tingfólkum móti teimum 13 hjá samgonguni.

Og er hetta meirilutin, so vita vit, hvat løgtingið vil. Talan er »bara« um eitt uppskot til samtyktar, so tað fær ongar – fyri sambandsfólk – óbehagiligar avleiðingar. Men løgmaður kann nær sum helst hála stikkið úr og útskriva val.

Skipað parlamentarisma kann tykjast í so skipað viðhvørt, tá einki ber til. Støðan í Føroyum í dag er tann øvuta. Og tað er áhugavert at síggja, hvussu leikur fer...

**» Nú kann fullveldismeirilutin fylkjast á tingi**

## Sterk sending um ferðsludeyða

Tað var ein sterk sending um ferðsludeyða, sum sjónvarpið hjá Kringvarpinum vísti í gjárkvøldið. Í sendingini varð tosað við avvarðandi hjá fólki, sum doyðu í trimum óhugnaligum ferðsluvanlukkum í 2007.

Harumframt varð tosað við kvinnuna, sum koyrdi bilin sum rendi á Ditlev og Rosu Eldevig á Sandvíkarhjalla á hvítusunnu í 2007.



*Hjálparfólk bjarga ungu kvinnuni úr bilinum, sum var Ditlev og Rosu Eldevig at bana*

Tað skal meira enn dirvi til hjá fólki, sum er komið í ta støðu at hava volt tveimum fólkum deyða, soleiðis at trína fram og tosa opið um evnið. Slíkt er hugtakandi – og hjartanemandi var tað eisini at hoyra dóttir teirra vísa fyrigeving.

At bilur, ferð og rúsevni eru deyðans vandamikil, tað vita øll, kortini henda slíkar vanlukkur við jøvnum millumbilum – vanlukkur, sum fullkomiliga broyta lívið eftir fáum sekundum.

Onnur vanlukkan var, tá Sámal av Reyni í Havn varð ákoyrdur tíðliga ein sunnumorgun, tá hann var á veg til gongu heim til hús eftir at hava koyrt taxa alla náttina. Eisini hesaferð var tað ein ávirkað ung kvinna, sum koyrdi bilin. Hóast kona og døttir ikki hava hitt kvinnuna, so hava tær fyrigivið henni.

Tríða vanlukkan var, tá 18 ára gamla Unn Hansdóttir misti tamahaldið á bilinum í hálku á Kalbaksfirði, rendi á Árna Gregersen, sum koyrdi mótsættan veg. Unn Hansdóttir doyði av vanlukkuni. Árni Gregersen greiddi frá, hvussu hann hevur tað, og hvussu væl tað hóast alt kendist at vita, at hann ikki var orsøkin til vanlukkuna.

Hetta árið – í 2007 – doyðu sjey fólk í ferðsluni. Tað var Bergljót Debes Hentze, sum legði hesa hugvekjandi sending til rættis.



*Bilurin hjá Ditlev Eldevig endaði oman fyri vegin. Ditlev doyði á staðnum, meðan Rosa doyði stutt eftir*



**» Roynir at gera nýggjan sannleika**

HELGI ABRAHAMSEN
KJAK Á SÍÐU 11



**» Hála buksurnar upp**

JÓAN PAULI DAHL
JAKOBSEN
KJAK Á SÍÐU 16



## Øll hava somu rættindi at vera her

Nýggjar bøkur eru komnar frá Bókadeild Føroya Lærarafelags. Ein teirra er *Hin stóra bókin um familjur.*

Hvat er ein familja? Fyri fáum árum síðani var ein familja ein mamma, ein pápi og tvey, trý børn. Men hesi seinastu árini er familjumynstrið broytt kring allan heim. Familjurnar eru sum ælabogans litir – sera fjølbroyttar: tær eru ymiskt samansettar, og tað er ymiskt, hvussu persónarnir í einstøku familjunum eru saman.

Í bókini fara vit at vitja nógvar familjur; vit fara við teimum út at ferðast, til arbeiðis, í skúla og fáa eitt sindur at vita um kelidýr, kenslur, familjutræ – og nógv annað...

Bókin hevur sum so einki aldursmark. Øll – eisini ella serliga – vit vaksnu kunnu læra nógv av bókini. Serliga hetta at rúma øðrum, sum eru øðrvísi enn vit. Bókin letur nevniliga upp fyri einum kjaki um, at hóast øll eru ymisk, hava vit somu rættindi at vera her. Mary Hoffmann skrivaði, Ros Asquith mynd prýddi og Gunnleyg M. Arge týddi. Bókin er 36 blaðsíður




Sosialurin
Tel. 341800
www.sosialurin.fo

Stovnaður: 1927
Ábyrgdarblaðstjóri: Eirikur Lindenskov
eirikur@sosialurin.fo
Útgevari: Sp/f Sosialurin

Uppseting: Sosialurin
Prent: Prentmiðstøðin
Avgreiðsla: mán - frí
kl. 08.00 - 16.00

**Marknaðardeild**
lysing@sosialurin.fo